# Stuðla lærarum

Í dag er fylgjandi skriv sent Landstýrismanninum í Mentamálum og Kommunafelag Føroya frá Magistarafelagnum.

"Viðvíkjandi ósemjuna millum Føroya Lærarafelag og Mentamálastýrið og Kommunufelag Føroya.

Magistarafelag Føroya lýsir hervið sín stuðul til Føroya Lærarafelag í hesum máli.

Magistarfelag Føroyar noktar limir sínar at taka á seg arbeiði, sum er umfatað av blokaduni hjá Føroya Lærarafelag."




# Nevnd afturvald

Maskinmeistarafelagið hevði aðalfund leygardagin tann 16. mars.

Fyri vali til nevndina stóðu Zacharias Zachariasen og Tummas Eli Joensen.

Teir vórðu báðir afturvaldir.

Sum tiltakslimir vóru valdir Jóan Petur Paturson og Jóan Símun Saltá.

Nevndin er skipað soleiðis:

Jógvan Nybo, Viðareiði er formaður

Zacharias Zachariasen, Skopun er næstformaður

Tummas Eli Joensen, Strendur,

Regin Olsen, Klaksvík og

Páll Hansen, Tórshavn

# Starvsmenn stuðla lærarum

Óli Holm fær nógv brøv frá fakfeløgum í samband við blokadutiltøkunum hjá Lærarafelagnum. Her er eitt frá Starvsmannafelagnum.

"Starvsmannafelagið vil her gera greitt, at vit fult og heilt stuðla Føroya Lærarafelag í blokadutiltøkum teirra og fara vit samstundis at mótmæla og átala, at Mentamálastýrið nýtir loyniligar blokadubrótarar, at gera uppgávurnar til skrivligu próvtøkurnar í sambandi við fráfaringarroyndirnar hjá 9. og 10. flokkunum, og sum eru raktar av blokaduni hjá Føroya Lærarafelag..

Heldur enn at fara undir slík undirgravandi og ódámlig spjaðingartiltøk, átti tað er verið meira sømuligt og sjálvsagt, at hildið seg til ta semju, sum gjørd er millum partarnar 30.04.2000 og fingið hesa sett hesa í verk. - Hetta tiltak tykkara, er til lítlan sóma fyri tygum og Mentamálastýrið !

Vit vilja eisini greitt boða frá, at vit nokta limum okkara, at taka upp arbeiði, sum er rakt av blokaduni hjá Føroya Lærarafelag.

## Vit leita eftir tær

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit vænta at tú ert lívlig/ur og óhátíðarlig/ur. Tú ert ein eldhugaður bólkaspælari og kennir, at sjálvsábyrgd og góð tillagingarevni skapa íblástur.

Vit vilja skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja serstakliga dent á opið og ærligt prátingarlag. Tað er við til at menna felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við einari útbúgving úr Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika til at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú kanst brúka útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, tlf. 348510.

Send umsóknina við avriti av próvskjølum til adressuna, nevnda niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 4. apríl 2002 kl. 18.00.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

www.sparikassin.fo
E-mail: steinbjorn.hardlei@sparikasssin.fo

FØROYA SPARIKASSI

†

Kunngjørt verður at mín kæra kona
og mamma, omma og langomma okkara

**Johanna Johannesen**
Inni á fjørð, Vestmanna,

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum páskadag,
86 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst í útvarpinum.

*Familjunnar vegna*
**Frits**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum
sýndu okkum samkenslu, tá ið kæri
maður, pápi, verfaðir og beiggi okkara

***Arni Nolsøe***

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur og kransar,
og tøkk til øll, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
***Jógvan og Anna***



# Funnu føroyskar giftingarring

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tey eru gift 7. september 1984 og maðurin eitur Manbjørn við einum n´ið. Í ringinum stendur "tín Mannbjørn. Ringurin hevur prýtt ein kvinnufingur. Tað er alt vit vita um ein vanligan slættan gullring, sum politiið í Esbjerg hevur í varðveitslu.

Fyri páskir kannaði politið húsini hjá eini kvinnu í Esbjerg, sum teir høvdu undir illgruna fyri stuldur. Politiið fann nógvar lutir sum kvinnan ikki átti, har í millum ringin við tí elskuliga orðinum "tín Manbjørn" ið vitnaði um hita og ást tann 7. september 1984 í hvussu er.

Vit heita nú á lesarar um at hjálpa okkum at finna eigarinnuna av hesum ringi, so vit kunnu fáa hann aftur til rætta viðkomandi.



*Vald mynd: Jens Kr. Vang*

# Mótmælir politiskar stýring

**Tjóðveldisflokkurin mótmælir politiskari stýring av vinnuni**

POLITIKKUR
*Tíðindaksriv*

– Bjarni Djurholm og Fólkaflokkurin eiga at halda seg burtur frá royndunum at stýra Framtaksgrunninum, Føroya Fiskasølu og Føroya Fiskavirking politiskt.

Hetta sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins í tíðindaskrivi.

Høgni Hoydal sigur, at tað er skelkandi at frætta í fjølmiðlunum, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur lagt seg út í arbeiðið hjá Framtaksgrunninum, sum eigur Føroya Fiskasølu og Føroya Fiskavirking. Ongin kunnging um ætlaðar broytingar í nevndini ella annað, hava verið frammi á landsstýrisfundi.

Tjóðveldisflokkurin vil hava greiðar linjur millum alment og privat, og vinnan skal virka á handilsligum grundarlag. Annars er vandi fyri, at vit enda aftur í tí vavgreyti av politiskum og privatum áhugamálum, sum elvdi til kreppuna í 80'unum.

Framtaksgrunnurin var ein kreppuloysn, har ein vinnurekandi, almennur grunnur fekk leiklutin at eiga tvær stórar fyritøkur. Tí er tað so sera týdningarmikið, at politisk stýring ikki fer fram, men at tað burturav eru vinnulig, handilslig atlit, ið telja í tí, sum víðari fer fram.

Neyðugt er at fáa eina væl grundaða politiska semju um, at Føroya Fiskasøla og Føroya Fiskavirking framhaldandi skulu rekast á vinnuligum og handilsligum grundarlagi. Og at tá fyritøkurnar skulu á privatar hendur, eru tað eisini vinnulig og handilslig atlit, ið telja. Landsstýrið skal bert tryggja sær, at landið fær sín pening aftur við rentu av rentu, sigur Høgni Hoydal, floksformaður í tíðindaskrivinum.

# Vinarbýarstevna í Garðabæ

NORRØNAFELAGIÐ
*Tíðindaskriv*

Vinarbýarstevna verður í Garðabæ í Íslandi í summar. Stevnan verður frá 20. til 23.juni. Garðabær, sum er millum Reykjavík og Havnarfjørðin, var eina ferð vinarbýur hjá Havnini. Tey í Norrøna felagnum í Garðabæ vilja fegin hitta føroyingar á stevnuni í summar og siga, at limir í Norrønu feløgunum í Føroyum eru vælkomin. Til ber at gista heima hjá fólki í Garðabæ. Hevur onkur hug at fara, ber til at siga Norrøna Felagnum í Føroyum frá.

## Skeið í íslendskum

Í juli verða skeið í íslendskum máli og íslendskari mentan fyri útlendingar. Byrjanarskeið verður frá 1. - 12.juli og framhaldsskeið frá 15. - 26.juli. Hvørt skeiðið kostar 3.000 danskar krónur, harafturat koma ferðin og uppihaldið. Norðurlandahúsið í Reykjavík kann útvega innivist.

Skeiðini vera í Reykjavík.

Umsóknarblað og upplýsingar eru á heimasíðuni www.nordice.is




